# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað hevði bøtt um umdømi USA, um forsetin segði okkum, hvar CIA-fangarnir eru (HRW-talsmaður).*

**STUTT SAGT**

## Samstarv á veg

Norðurkoreanski samráðingarleiðarin í kjarnorkusamráðingunum, Kim Kye-gwan, sigst vera á veg til USA at tosa við amerikanska samráðingarleiðaran, Christopher Hill, í Washington. Sum skilst skal hann eisini til San Fransisco, har hann skal hitta ymsar óheftar bólkar. Samstundis er ein suðurkoreonsk samráðingarnevnd komin til Norðurkorea at tingast við stýrið har um matvøruhjálp og onnur viðurskifti. Suðurkorea hevur longu boðað frá, at landið er sinnað at lata grannanum fyri norðan nógva matvøruhjálp.

## Vilja sleppa í rúmdina

Tey, sum kunnu hugsað sær at sleppa eina ferð út til altjóða rúmdarstøðina ISS, skulu hava gott tol, tí tað er einki pláss eftir við teimum russisku Sojusferjunum fyrr enn eina ferð næsta ár. Fyrsta ferðin í ár verður í apríl, og tá skal amerikanski ríkmaðurin Charles Simonyi út til ISS, og hann verður tann sætti rúmdarferðamaðurin. Aftan fyri hann standa tveir suðurkoreanar í bíðirøð. Amerikanarin Anousher Ansari, sum var á ISS í fjør, hevur sagt, at hann kundi hugsað sær eina ferð afturat út hagar, men at kona hansara sigur nei. Tað kostar 21,5 mió. dollarar at sleppa eina ferð út til ISS-støðina.

## Var ætlað Karzai

Amerikanska herleiðslan í Afghanistan heldur, at bumban, sum brast uttan fyri amerikonsku herstøðina Bagram í gjár, var ætlað afghanska forsetanum, Hamid Karzai. Afghonsku myndugleikarnir halda harafturímóti, at bumban var ætlað amerikanska varaforsetanum, Dick Cheney, sum var á Bagram-støðini. Taliban átók sær í gjár ábyrgdina av spreingingini og váttaði samstundis, at rørslan hevði lagt bumbuna við tí fyri eyga at beina fyri Dick Cheney.

# Hon hevur ein trupulleika

**Amerikanararnir hava ikki gloymt, at Hillary Clinton atkvøddi fyri innrásini í Irak, og tað kann kosta henni dýrt í seinna enda.**




*Hillary Clinton trýsti á jaknøttin í Senatinum, tá tað viðgjørdi innrásina í Irak. Tað skuldi hon ikki havt gjørt.*

Sjálvt um amerikanska forsetavalið ikki verður fyrr enn um eitt ár og níggju mánaðir, er valstríðið langt síðani farið í gongd. Høvuðsevnið í løtuni er kríggið í Irak, og tey demokratisku valevnini royna av øllum alvi at sannføra veljararnar um, at tey vóru og eru ímóti krígnum.

Senatorurin John Edwards, sum fegin vil sleppa at stilla upp fyri demokratarnar, var millum teirra, sum atkvøddu fyri, tá Senatið atkvøddi um avgerðina hjá George W. Bush at leypa á Irak. Men hann hevur langt síðani biðið um umbering fyri, at hann styðjaði avgerðina hjá forsetanum.

Hillary Clinton atkvøddi eisini fyri innrásini í Irak, men enn er eingin umbering komin frá henni. Hon hevur sagt, at hon hevði ikki atkvøtt fyri, um sami spurningur kom fyri Senatið í dag. Men umbering? Nei.

-Tað er greitt, at høvdu vit vitað tað, sum vit vita í dag, hevði málið als ikki komið í Senatið, og kom tað, hevði eg ikki atkvøtt fyri, segði hon í síðstu viku.

Men hjá nógvum veljarum er hetta ikki nóg mikið, og meiningakanningar teir seinastu dagarnar vísa, at tað kann koma at kosta henni dýrt, at hon trýsti á jaknøttin tann dagin í Senatinum. Mánadagin vísti ein kanning hjá Zogby-stovninum, at hevði forsetavalið staðið millum Hillary Clinton og republikanaran Rudi Giuliani, hevði Giuliani vunnið. Úrslitið hevði verið tað sama, um valið stóð millum Hillary Clinton og republikanska senatorin John McCain. Harafturímóti hevði Barrack Obama vunnið á teimum báðum.

# CIA-fangar horvnir

**Mannarættindafelagsskapurin Human Right Watch vil hava amerikanska forsetan at siga, hvat er vorðið av fólki, sum CIA hevur tikið.**

-Bush-umsitingin eigur at koma við upplýsingum um fólk, sum eru horvin í fongslum hjá CIA. Umsitingin eigur at siga, hvørji tey eru, hvar tey hava sitið fangar, og hvat er vorðið av teimum, segði talsmaðurin hjá Human Rights Watch, Joanne Mariner, tá hann legði frágreiðingina um CIA-fangarnar fram í New York í gjár.

George W. Bush, forseti, segði í september í fjør, at teir seinastu 14 fangarnir, sum CIA hevði havt í varðveitslu, vóru fluttur í Guantanamo-fangaleguna í Kuba.

Men Human Rights Watch ivast í hesum og hevur sent Hvítu Húsunum tveir listar við nøvnunum á persónum, sum eru horvnir. Á øðrum listanum eru 16 fólk, sum sambært CIA hava verið fangar í CIA-fongslum, men sum eru horvin síðani. Á hinum listanum eru 22 fólk, sum kanska hava verið fangar hjá CIA, og sum heldur ikki eru at finna.

Human Rights Watch sigur seg hava illgruna um, at CIA hevur flutt teir horvnu fangarnar til lond sum Algeria, Egyptaland, Libya og Sýrialand, har fangar ofta verða píndir.

Talsmenn hjá Hvítu Húsunum høvdu ongar viðmerkingar til listarnar frá Human Rights Watch í gjár.



*Egyptin Osman Hassan Mustafa Nasr vil vera við, at agentar hjá CIA burturfluttu hann í Italia og fluttu hann til eitt fongsul í Egyptalandi, har hann bleiv píndur.*